# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 29.09.2025 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Poul Laust Christiansen
Rakul Mørk
Jóhannes Liasson Rasmussen
Jónfinn L. Poulsen
Otto West

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-50-2025: Umsókn um fíggjarligan stuðul til ABC vikuna 2025.**
   Nú Hvalbiar Kommuna hevur verið við í ABC átakinum í 5 ár, verður søkt um fíggjarligan stuðul til at gera eitt sindur eyka burtur úr.
   **Trivnaðarnevndin 29.09.2025:**
   Nevndin er samd um at játta stuðulin til ABC vikuna, m.a. við pizza, køku v.m. til felags sunnudagsskúlan.
   **Fíggjarnevndin 29.09.2025:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla ymisku tiltøkunum við í mesta lagi kr. 15.000,00 íalt.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

2. **102-4-2025: Umsókn frá Sp/f MP Tek um loyvi at skifta út tangar á Effo-støðini.**
   Vegna Effo verður søkt um loyvi at skifta út tangarnar á støðini í Hvalba, matr. nr. 207d. Byggimálsviðgerin hevur viðgjørt umsóknina, somuleiðis Friðingarnevndirnar, Landsverk og Arbeiðs- og Brunaeftirlitið.
   **Tekniska nevnd 28.09.2025:**
   Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndini og byggimálsviðgeranum og geva loyvi til at skifta út tangarnar sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at arbeiðið verður framt í fullum samsvari við hjálagda loyvi og hjáløgdu treytum frá avvarðandi myndugleikum.

3. **102-53-2025: Kostnaðarmeting av lykt á Fiskieiðinum.**
   Arbeiðsformaðurin er biðin um at kanna møguleika og kostnað av at seta nýggja lykt upp á Fiskieiðinum. Samlaði kostnaðurin er mettur til kr. 92.000,00, her er íroknað íbindingargjald til SEV, tilfar/arbeiðsløn, lyktir, grevstur, skúrur og uppsetan av pela.
   **Tekniska nevnd 28.09.2025:**
   Nevndin mælir til at geva loyvi til hetta. Tó vil nevndin, at betrast skal um trygdina við girðingini.
   **Vega- og havnanevndin 25.09.2025:**
   Nevndin mælir til, at hetta verður gjørt og at kannað verður, um trygdin er í lagi ella um nakað skal gerast við girðingina.
   **Fíggjarnevndin 29.09.2025:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at fáa hetta gjørt. Somuleiðis varð samtykt at kanna, um bøtast skal um trygdina viðvíkjandi rimagirðingini.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

4. **102-54-2025: Umsókn um sundurbýti v.m. matr. nr. 339a, Hvalba.**
   Søkt verður um at fáa matr. nr. 339a sundurbýtt.
   **Tekniska nevnd 28.09.2025:**
   Nevndin mælir til, at sundurbýtið fer fram.
   **Vega- og havnanevndin 25.09.2025:**
   Nevndin metir, at tað er í lagi at selja hetta, treytað av, at keypararnir bera allan kostnaðin av hesum.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

5. **102-70-2022: Vatnveiting – kostnaðarmeting á Knænum.**
   Sum ein liður í samlaðu vatn-verkætlanini í Hvalba, er kostnaðarmeting gjørd fyir at gera inntakið á Knænum.

| | |
|---|---|
| At grava tilfar burtur – tilfar og arbeiðsløn | kr. 23.000,00 |
| Rustfrítt kar – smiðja ger arbeiðið | kr. 75.000,00 |
| Uppsetan av inntaki – tilfar og arbeiðsløn | kr. 16.000,00 |
| Leggja PVC dúk í botnin – tilfar og arbeiðsløn | kr. 15.000,00 |
| Knýta saman (samla) inntak – tilfar og arbeiðsløn | kr. 13.000,00 |
| Leiða yvirskotsvatn burtur – tilfar og arbeiðsløn | kr. 21.000,00 |
| Tyrving – tilfar og arbeiðsløn | kr. 42.000,00 |
| Samlaður kostnaður | **kr. 205.000,00** |

   Síðani metingin varð gjørd, eru tvey tilboð innkomin uppá rustfrítt kar – kr. 57.600,00 u/MVG og kr. 45.550,00 u/MVG.
   **Tekniska nevnt 28.09.2025:**

Nevndin mælir til, at hetta verður gjørt sum skjótast. Mælt verður til at taka av lægra tilboðnum.
**Fíggjarnevndin 29.09.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at fáa hetta gjørt sambært kostnaðarmetingini og at tikið verður av lægra tilboðnum kr. 45.550,00 u/MVG uppá framleiðslu av rustfríum kari.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

6. **102-56-2025: Løðistøðir í Hvalba og uppmerking av P-básum.**
Hvalbiar kommuna hevur samskift við Effo um møguligan áhuga at seta upp løðistøðir í Hvalba. Effo hevur mett um íløgukostnaðin og eru sinnaðir at vera partur av hesi verkætlan, um kommunan og Effo í felag kunnu bera útreiðslurnar av íløguni.
**Tekniska nevnd 28.09.2025:**
Nevndin mælir til, at hetta verður gjørt.
**Vega- og havnanevnd 25.09.2025:**
Nevndin mælir til, at hetta verður gjørt, so tað verður lættari hjá elbila-eigarum at vitja í Hvalba.
**Fíggjarnevndin 29.09.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at fáa hetta gjørt og at býtið av íløguni verður eftir uppskoti frá Effo.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

7. **102-59-2025: Bingjuplássið í Sandvík – skúrur.**
Eftir áheitan frá Teknisku nevnd, hevur arbeiðsformaðurin gjørt eina kostnaðarmeting av nýggjum skúri til bingjuplássið í Sandvík. Mettur kostnaður er kr. 89.577,00 fyri nýggjan skúr, meðan gamli skúrurin av bingjuplássinum í Hvalba kann umvælast fyri umleið kr. 25 – 30.000,00.
**Tekniska nevnd 28.09.2025:**
Nevndin mælir til, at gamli skúrurin verður umvældur og fluttur til Sandvíkar.
**Vega- og havnanevnd 25.09.2025:**
Nevndin mælir somuleiðis til, at gamli skúrurin verður umvældur og fluttur til Sandvíkar.
**Fíggjarnevndin 29.09.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at umvæla gamla skúrin og flyta hann til Sandvíkar.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

8. **102-55-2025: BHS venjing – tilboð til eldri 60+.**
Bú- og Heimatænastan Suðuroy hevur sett ein fysioterapeut í starv aftrat 35 tímar um vikuna. Harvið kann tænastan viðvíkjandi heilsufimleiki betrast og røkka út um alla oynna, soleiðis at øll 67+ hava møguleika at luttaka í venjing hjá BHS. Tilboðini hjá BHS liggja millum kl. 08.00-15.00. Mælt verður til, at Tvøroyrar Kommuna letur BHS atgongd til Stórá 2 dagar um vikuna fyri at kunna veita hesa tænastu. Janus Thomsen hevur eisini bjóðað skúlan í Hvalba ella Roynhøllina

fram til hetta tiltak.
**Trivnaðarnevndin 29.09.2025:**
Nevndin metir, at hetta er eitt sera gott hugskot, sum fer at javnseta borgarar í norðaru helvt við teir í sunnaru helvt og mælir til, at farið verður undir hetta. Hvalbiar Kommuna kann vísa á hølir til endamálið s.s. Roynhøllina og Hvalbiar skúla.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og bjóða Roynhøllina fram.

**9. Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.40

Janus Thomsen Poul Laust Christiansen Rakul Mørk

Jóhannes Liasson Rasmussen Otto West Jónfinn L. Poulsen